# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

planet.fo




## Stuðulskonsert fyri Krabbameinsfelagnum

Jens Marni, Eyðun Nolsøe og Ragnar í Vík verða ímillum tónleikararnir, ið fara at framføra fríggjakvøldið í Vestmanna. Tað er 10. flokkur í Vestmanna Skúla, ið skipar fyri konsertini, og peningurin fer óskerdur til Føroya Felag ímóti Krabbamein.

Vestmanna Skúli er farin undir eina verkætlan, har næmingarnir skulu læra hvussu tað er at savna pening inn til eitt hvørt endamál. Næmingarnir hava valt at lata allan peningin fara til Føroya Felag ímóti Krabbamein, og komandi fríggjakvøld verður aftur eitt tiltak í Vestmanna.

Talan er um tónleika framførslur, har Jens Marni Hansen, Eyðun Nolsøe, Ragnar í Vík, Martin Joensen og Oniontree fara at framføra. Eisini fara lokalir bólkar á pallin. Talan er um bólkarnir Brim og Thunderbirds.

Konsertin fríggjakvøldið er triðja tiltak, ið næmingarnir skipa fyri. Frammanundan hevur verið barnadiskotek og tombola, og næmingarnir siga, at privat fólk og fyritøkur hava víst stóran áhuga, og hava verið ein dyggur stuðul í verkætlanini.

- Tað er strævið at skipa fyri tiltøkum, tá vit eru so fá í flokkinum. Vit eru bara 11 næmingar, og tað blívur nógv ringarí aftur og fram, siga næmingar úr Vestmanna Skúla.

Hóast fríggjakvøldið vendir sær til tey ungu og vaksnu, so er eisini okkurt á skránni fríggjadagin fyri børn. Frá 15.00 til 18.00 verður eitt barnatiltak í ítróttarhøllini í Vestmanna, og verða millum annað hoppiborgir og fiskabrunnar til børnini at hugna sær við.

Leygarkvøldið verður eisini eitt stuðulstiltak á skránni. Neytalortakapping verður í Vestmanna, og øll áhugaði kunnu venda sær til Føroya Banka.

- Vit hava ikki sett okkum nakað mál fyri hvussu nógvir pengar vit skulu savna, men alt ger mun, og allir stuðul er kærkomin, siga næmingar úr 10.flokki í Vestmanna Skúla.

## Linda skal syngja um pengar

Tað fer at snúgva seg um pengar, tá Linda Andrews trínur á X-Factor pallin aftur komandi fríggjakvøld.

Temaði í komandi X-Factor sendingini er ABBA. Allir luttakararnir skulu framføra eitt lag hjá kenda svenska bólkinum, og í dag bleiv almannakunngjørt, at Linda skal framføra kenda lagið Money money money.

Linda hevur áður sungið løg sum "Because of You", "Vårvise" og "You can't hurry love", og nú gongur leiðin yvir til svenska popp bólkin ABBA.

Hvussu hetta fer at eydnast verður greitt fríggjakvøldið, tá X-Factor aftur er á skránni.



## ORKA við á franskari savnsútgávu

Herfyri frættist, at franska felagið Ici D'ailleurs hevði givið út fløgu hjá føroyska bólkinum ORKA. Nù er bólkurin við á savnsútgávu hjá felagnum, sum er tøk á netinum.

ORKA hevur fingið nógv burturúr at taka lut á tónleikastevnum úti í heimi, og eitt úrslit var, at franska felagið Ici D'ailleurs gav fløguna hjá ORKA út og tók á seg útbreiðslu av fløguni.

Nú er enn eitt stig tikið, ið er eitt fet framá hjá føroyska bólkinum. ORKA er nevniliga millum nøvnini á savnsfløgu, ið er tøk á netinum.

**Savnið ber heitið Winter og fleiri bólkar og einstaklingar eru savnaðir á útgávuni:**

1. Pigeon Jelly, Zero
2. Something About Ghosts, Matt Elliott
3. Market Diktat song, Jean-Philippe Goude
4. Í Mínum Æðrum (feat. Deadverse), Orka
5. Darling, darling, darling..., Chapelier Fou
6. A Travers Les Gens Comme Au Fond De Moi, Arnaud Michniak
7. Vacuum tubes, Deity Guns
8. Sunday negative, Arca
9. OuMuPo mix, Chapelier Fou

## Mamma Mia til Danmarkar

Vælumtókti sangleikurin Mamma Mia er nú ávegis til Danmarkar

Sangleikurin Mamma Mia byrjaði sína succes í London´s West End í 1999 og er nú á rundferð kring allan heimin.

8 uppsetanir eru í gongd runt um í heiminum í løtuni - harav er ein nú komin til Danmarkar, og verður Mamma Mia framført í Keypmannahavn, Odensen og Aalborg í summar.

Fleiri enn 32 milliónir hava hugt eftir hesum sangleikum runt alla verðina. Í Danmark hevur Mamma Mia fingið 6 stjørnur av Jyllandspostinum & BT, ið eisini hava mett sangleikin at verða í heimsklassa.

